# Reisigildi í Kollafirði

**Heðin Mortensen**
*formaður í mentunarnevndini*



Sum formaður í mentunarmálanevnd Tórshavnar býráð gleðir tað meg almikið, at Ítróttarhøllin í Kollafirði er komin so langt, at hon nú er innilokað.

Tað, sum gleðir meg mest, er, at vit góvu eitt lyfti um, at ítróttarhøllin í Kollafirði bleiv bygd í hesum valskeiðnum. Hetta lyfti hava vit hildið, soleiðis at øll Tórshavnar kommuna hevur fingið eitt aktiv fyri allar borgarar.

Á kunningarfundinum um ítróttarhøllina í Kollafirði, har eg legði uppskotið fram, helt ein kollfirðingur, sum ikki rættiliga trúði upp á lyftini hjá mær um høllina, fyri, at nú hevði Heðin Mortensen vassað langt út, hann ikki bara vassaði langt út, men hann hevur fingið væl og virðiliga upp í styvlarnar.

Við hvørt er tað neyðugt, um nakað skal henda, at váða nakað, men eg fekk ikki uppí styvlarnar og bleiv ikki vátur - hallarlyftið er hildið.

Samstarvið millum kommununa og øll tykkum, sum sjálvboðin hava hjápt til við arbeiðnum upp á høllina, og hava gjørt sítt til, at hetta er komið so langt, er fyrimyndarligt. Eitt gott prógv um, at ein kann koma langt við málum, sum skulu fremjast, tá ið samstarv og vinarlag er í hásæti.

Tað er Tórshavnar kommuna, sum stendur sum byggiharri av høllini. Men áhugafelagið Hallarstuðul hevur staðið fyri tí grundleggjandi arbeiðnum. Her er grivið út, planerað og fundament er stoypt til høllina. Hetta hevur verið eftir eini ætlan, sum hevur hildið.

Nú er so høllin reist og innilokað. Íslendingar hava eisini gjørt eitt gott og skjótt arbeiði.

Hetta er ein stór høll, umleið 1800 fermetrar, nokk ein tann størsta í Føroyum. Hon skal hýsa 700 sitandi áskoðarum, umframt 300 standandi.

Umframt høllina er eisini ætlanin at hava annað virksemi í eini 550 fermetra stórum hølum oman fyri inngongdina.

Høllin kemur at verða karmur um hondbóltsfelagið KÍF, sum higartil hava hildið til í Hoyvíkshøllini. Henda høll kemur eisini at verða miðdepil fyri allan Kollafjørð. Ung, tilkomin og eldri koma at hava sítt virksemi her, sum miðsentur og bygdarhús. Eisini skal skúlin sjálvandi brúka høllina í dagtímunum.

Tað er ein fragd at vera við til at skapa karmar og trivnað í eini kommunu. Í ár er eisini arbeiðið við gerð av nýggjum uppíbygningi til skúlan í Kollafirði fyri 20 milliónir krónur byrjað. Ein skúli, sum verður ein tvey-sporaður skúli frá 1. til 9. flokk. Tað hevur nógv at siga, at ungdómurin er á staðnum, fær sína útbúgving har og fær sítt frítíðarvirksemi nøktað við góðum karmum.

Fari at enda við góðynskjum at ynskja Kollafirði og kollfirðingum eins og øllum borgarum í Tórshavnar kommunu hjartaliga tillukku við ítróttarhøllini í Kollafirði.

# Skerjingar og sparingar á Suðuroyar Sjúkrahúsi?

**Jaspur Vang**
*Tvøroyri.*



Virksemi og fleiri týdningarmiklar tænastur á Suðuroyar Sjúkrahúsi eru niðurlagdar, eins og tað er sera ivasamt, hvørt íløgan og dagføringin av Suðuroyar Sjúkrahúsi fyri bert fáum árum síðani verða gagnnýtt til fullnar. Mong spyrja tí undrandi, hvørt talan var/er um miðvísar landspolitiskar - og/ella landsumsitingarligar skerjingar og sparingar. Komið er har til, at endalig greiða má fáast á hesum viðurskiftum.

Í stóran mun snýr almenna orðaskiftið seg um, hvussu stórar ymisku rakstrarjáttaninar og íløgurnar á landsfíggjarlógini eru. Í minni mun verður kannað og mett um, hvat borgarin og samfelagið fáa burtur úr hesum rakstrarjáttanum og íløgum. Vit eiga eisini at hava í huga, at gjøgnum rakstrarjáttanir og íløgur stýra landspolitik-ararnir búskaparligu gongdini og tænastustøðinum í ymisku pørtunum í landinum, eins og vit eiga at hava í huga - og hava eyguni eftir, at leiðslurnar á ymisku landsstovnarnir og landsumsitingarnar føra landspolitisku ætlaninar út í lívið og fylgja upp og gagnnýta gjørdar íløgur.

**Umbyggingin av Suðuroyar Sjúkrahúsi.**

Fyri fáum árum síðan var um- og útbyggingin av sjúkrahúsbygninginum í oynni liðug. Talan var sjálvsagt um eina tiltrongda dagføring av arbeiðsumstøðunum hjá starvsfólkinum, neyðuga tøkniliga dagføring og menning og eina ábót á umstøðurnar hjá vitjandi sjúklingunum.

So løgið tað enn ljóðar, kunnu vit í dag staðfesta, at eftir útbyggingini verða væl fleiri sjúklingar sendir til kanningar og viðgerðar á Landssjúkrahúsinum, enn áðrenn útbyggingina, eins og kostnaðarmikil nýggj høli og nýmótans útgerð stendur tøk stórar partar av samdøgrinum. Mong ivast í, hvørt samsvar er millum politiska ætlan og íløgu aðrumegin og umsitingarligan vilja og útinnan í verki hinumegin.

Undir øllum umstøðum eigur tað als ikki at vera neyðugt, at sjúklingar og avvarðandi skulu leggja niður fyri einstaka borgaran og samfelagið kostnaðarkrevjandi arbeiðsdag/-ar fyri at fara til mangan lítið tíðarkrevjandi kanningar/viðtalur á Landssjúkrahúsinum, tá hesar kanningar/viðtalur eins væl kundu fari fram á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Tænastustøðið er als ikki nøktandi, tá sjúk børn og eldri, sjúk menniskju árla á morgni, mangan fastandi, skulu av oynni og um Suðuroyarfjørð til langar bíðirøðir og smávegis kanningar og viðtalur í Havn, tá hesar tænastur kundu verið veittar í oynni. Uttan iva setast mong aftur og fáa ikki tað hjálp, teimum tørvar.

**Niðurlagdar tænastur á Suðuroyar Sjúkrahúsi.**

Fylgjandi tænastur/funktiónir á Suðuroyar Sjúkrahúsi eru stillisliga niðurlagdar:

- røntgenlækni (vitjaði uml. 14. hvønn dag).
- medicinskur yvirlækni (vitjaði uml.4 ferð pr. mnð.),
- eygnalækni (vitjaði uml. 1 ferð pr. mnð.), og
- oyrnalækni (vitjaði uml. 1 ferð pr. mnð.).

Eisini økispsykiatriska tænastan í oynni er steðga og mugu hesir sjúklingar, hvørs gerandisdagur ikki altíð er so lættur, í størri mun enn áður av oynni til viðgerðar.

At oman fyri nevndu tænastur eru niðurlagdar, hevur við sær, at viðgerðartíðin gerst longur, eins og umsitingarliga byrðan veksur. Eitt nú skulu røntgenmyndir, royndir av ymiskum slag og skrivligt tilfarð sendast aftur og fram millum Suðuroyar Sjúkrahús og Landssjúkrahúsið. Vandin fyri skeivleikum og misskyljingum gerst væl heldur ikki minni, jú longur og tyngri samskiftið og umsitingarligu gongdirnar eru.

Arbeiðsorka og peningur verða harumframt nýtt til flutning av sjúklingum millum Suðuroynna og Landssjúkrahúsið, tí nevndu tænastur ikki longur eru í oynni.

Tað sigst, at umsitingarliga frágreiðingin um, hví omanfyri nevndu tænastur vórðu steðgaðar, var "óloystir lønarspurningar". Ár, fíggjarlógir og lønarsamráðingar á arbeiðsmarknaðinum eru nú farin aftur um bak síðani hesa frágreiðing og kann hon tí ikki longur góðtakast.

Talan hevur verið um at fáa í lag eitt diabetesambulatorium á Suðuroyar Sjúkrahúsi, soleiðis at tey mongu, ið hava hesa sjúku, kundu fingið neyðuga røkt í oynni. Tað er tó langt síðani, at nakað hoyrdist um hesar ætlanir.

Hóast førleika og góðar umstøður at gera skurðviðgerðir á Suðuroyar Sjúkrahúsi og harvið møguleika at skerja bíðilistarnar til skurðviðgerðir á Landssjúkrahúsinum, hevur vilji ikki verið til at veita Suðuroyar Sjúkrahúsi játtan til narkosulækna. Hettar hóast hini bæði sjúkrahúsini í landinum hava slíka játtan.

Stundin er komin, at greiða má fáast á fylgjandi spurningum:

- nær varð avgerð tikin um at niðurleggja nevndu tænastur ?
- hvør tók avgerð um at leggja niður tænasturnar ?
- hvat er veruliga orsøkin til, at omanfyri nevndu tænastur eru niðurlagdar?
- hvat er gjørt fyri at varðveita/seta í verk aftur niðurløgdu tænasturnar?
- hvat bleiv av ætlanunum um diabetesambulatorium á Suðuroyar Sjúkrahúsi?
- hvat er gjørt fyri at kanna, hvørjar tænastur, t.d. skurðviðgerðir av ávísum slag, kundu fari fram á Suðuroyar Sjúkrahúsi?
- verður íløgan í Suðuroyar Sjúkrahús gagnnýtt til fullnar?
- er lækkaða tænastustøðið (skerjingarnar/sparingarnar) á Suðuroyar Sjúkrahúsi grundað á politiskar og/ella umsitingarligar ætlanir og avgerðir ?

**Yrkisligi førleikin.**

Jú færri førleikakrevjandi tænastur/funktiónir eru í økinum, jú minni verður sjálvsagt yrkisligi førleikin og harvið dugurin í sjúkrahúsinum, eins og yrkisliga umhvørvið og støðið á sjúkra- húsinum sum lærupláss og áhugavert arbeiðspláss fellur.

Havandi í huga, at ein vælvirkandi heilsuskúli er í oynni, eins og politiskar ábendingar eru um, at talan kann verða um at leggja aðra útbúgving innan sjúkrahúsverkið í oynni, er neyðugt, at landspolitiski myndugleikin og landsumsitingin av sjúkrahúsverkinum finna felags stev og seta út í kortið soleiðis, at tænastustøðið og yrkisliga støðið og harvið yrkisliga umhvørvið á Suðuroyar Sjúkrahúsi koma aftur á sama støðið, sum áðrenn framman fyri nevndu skerjingar/sparingar.

Tænastustøðið, yrkisliga støðið og harvið yrkisliga umhvørvið má harumframt miðvíst verða hækkað samsvarandi krøvunum til eitt framtíðar læruplass og eitt eisini í framtíðini áhugavert og avbjóðandi arbeiðspláss.

# Íslendsk stevna við føroyingum

**Føroyingar eru við á lista- og hondverkarastevnu í Reykjavík hesa vikuna**

LISTASTEVNA
*tíðindaskriv*

Vestnorden arts and crafts verður hildi í Laugardalshøllini í Reykjavík 16. - 19. september.

Stevnan var fyriskipað á fyrsta sinni Reykjavík í 2002. Við á stevnuni vóru fólk úr Kanada í vestri til Finnland og Baltisku londini í eystri. Málið við stevnuni er at vísa mentan og list á høgum støði í londunum í Vestnorðuri. Sjálvandi er lagt soleiðis tilrættis at høvi er hjá fólki at hittast, læra og hugtakað list úr øðrum londum. Somuleiðis er tað eitt mál at tá stevnan er farin afturum eru fólk komin at kennast og vónandi samskifta víðari um møguliga sølu av list og handverki.

Føroyingar hava verðið við til stevnuna fyrr. Hesuferð eru luttakararnir Vígdis Petersen, Helgi Joensen, Sirri og Tutl.

Vígdis sum er búsitandi í Keypmannahavn hevur á hesa stevnuni prýðislutir við sær, sí meiri um hvat hon fæst við á www.vigdis.dk . Helgi sum býr í Norra er helst mest kendur fyri sínar skulpturar og tað er eisini tað hann hevur við við til Íslands. Sí nærri á heimasíðuni www.helgijoensen.no.

Suðuroyar Ullvirki er sum kunnugt einasta spunavirki í landinum sum spinnur føroyska ull. Sirri tilvirkar pløgg úr úr hesum tilfarinum. Nýggja heimasíðan www.sirri.fo er helst forvitnislig at leita á. Tutl gevur sum kunnugt tónleik út, teirra heimasíða er at finna á www.tutl.fo.

Meiri um skránna á stevnuni sæst á heimasíðuni www.vestnordencrafts.com





# Grátið! Bygdarmenn

**Mannbjørn Tausen**
*Í Vági, tann 14. sept 2004*

Leygarkvøldið bórust tey stórtíðindi í Vági, at sjálvur løgmaður saman við tveimum fylgisveinum
var komin til bíggjar. Postivt hugsandi, so mátti orsøkin vera Polarfost, sjálvandi. Men gakk. Fylgisveinarnir vóru mentamálaráðharrin og heilsu- og almannaráharrin og ikki vinnumáláraháharrin.

Hvørji vóru so ørindini? Jú, tey vóru - stutt og greitt: *At bróta niður!* At hugsa sær: fyri bert tveimum vikum síðani var skjøtil aftur settur á tosið um Polarfrost - at nú, ja (aftur) *nú* skuldi okkurt henda. Men tað fyrsta, ið hendir, er, at okkurt annað skal saboterast. Miðnámsskúlin skal flytast úr Vági. Hvagar?? Til Hovs? Trongisvágs? Eg ivist. Allarhelst verður hann fluttur til Havnar, út í Marknagil. Men vilja vit stuðla hesari ætlan, ja, Gud hjálpi mær, afturfyri skulu vit fáa eitt *spildurnýtt* Ellis- og røktarheim. Tað varð lovað býráðnum av hesum mátt(vald)miklu monnum, við sjálvum løgmanni á odda.

Hvat er hetta fyri svans? Hevur ikki nokk av stríði og klandri verið um henda vælsignaða Miðnámsskúla? Við tykkara hjálp og við nøkrum hjálparleysum politikarum fara vágbingar nú uttan iva at klandrast um Ellisheim ella skúla. Viðmerkingin hjá borgarstjóranum á Tvøroyri hevur so ikki gjørt tað betri. Eitt tílíkt klandur nívur fast.

Byggið skúlan! Hyggið *eisini* at ætlanini hjá Magna Laksafoss, ið hann vísti okkum/tykkum so meistarliga á í Stóra Pakkhúsi í fjør. Eitt heim á somu stødd sum Eysturoyar Ellis -og røktarheim, har 70 - 100 arbeiðspláss eru. Hví skal tað partú vera antin....ella? Hvat er orsøkin? Er tað ikki *ómegdin* sum so tíðiliga kemur her til sjóndar? Er tað ikki fyri at fáa okkum her í økinum at venda eyguni annan veg, enn á okkara politikarar. Hava teir ikki staðið á hvørjum trappusteini í Vági og tosað um loysnir. Er hetta tað, tit lovaðu tykkara veljarum og stuðlum - eina nullloysn? Fyri at fáa, mugu vit geva??

Grátið! Bygdarmenn. Grátið! Suðringar.

# Byggingin av miðnámsskúlanum skal halda fram

TÍÐINDASKRIV

*Vágs Býráð*
*Jógvan Krosslá*



Vísandi til fundin millum Vágs býráð og umboð fyri Føroya Landsstýri/Føroya løgting tann 11.09.2004, fara vit at loyva okkum at koma við hesum viðmerkingum.

Á fundinum, har landsins fremstu menn luttóku, var uppskot lagt fram fyri okkum, um vit vildu ganga við til at ætlaði miðnámsskúlin varð fluttur til Hovs, móti at vit í staðin fingu eitt røktarheim bygt á økið, har miðnámsskúlin skal verða.

Sagt verður í fjølmiðlunum, at landsstýrið hevði uppskot um at byggja eitt røktarheim í Vági í skjáttuni. Harvið kunnu fólk lætt fáa ta fatan, at her var borðreitt við lidnum projekti og játtaðari fígging, soleiðis at byggingin kundi fara í gongd beinanvegin.

Fyri at ongar misskiljingar skulu verða, fara vit við hesum tíðindaskrivi at koma við nøkrum rættingum og upplýsingum í málinum, soleiðis at borgararnir í Vági og suðuroyingar annars veruliga fáa lýst, hvat liggur í hesum máli.

Vit fingu fríggjadagin tann 10.09.2004 fundarboð, har sagt varð frá, at umboð fyri Føroya landsstýri vildu hitta býráðslimirnar í Vági á máli leygardagin tann 11.09. 2004.

Fundurin byrjaði kl. 15.00 og uttan at fara niður í smálutir, hvat ført varð fram á fundinum, kundu vit í Vágs býráði skjótt sláa fast, at her var ikkinógv hjá okkum at taka undir við.

Umboð fyri landsstýrið og løgtingið førdu fram, at um Vágs býráð vildi ganga við til at ætlanin við Miðnámsskúlanum á Vágseiði varð slept, so vildu teir virka fyri, at eitt røktarheim varð bygt á byggiøkinum hjá nýggja miðnámsskúlanum.

Tað, sum undraði okkum var m.a.:

- Uppskotið um at byggja røktarheim á Vágseiði var ikki skrivligt.
- Eini projekt varð lagt fram, ið vísti ætlaðu byggingina.
- Sagt varð, at kostnaðurin kanska fór at verða áleið 35 mió. Kr., men einki varð upplýst, um landsmyndugleikarnir høvdu játtan tilbyggingina.
- Sambært lógini skulu kommunurnar verða við í bygging av røktarheimi við upp til 50% av íløgukostnaðinum. Kostnaðurin hjá Vágs kommunu hevði verið áleið 5 mió. kr., sum kommunan í verandi løtu ongar møguleikar hevur fyri at útvega.
- Í sambandi við hesa verkætlan hevur okkum kunnugt ikki verið tosað við kommunurnar í Suðuroy um ætlanina at byggja røktarheim. Sostatt kunnu vit staðfesta, at hvørki fígging ella tilsøgn frá kommununum fyriliggur.
- Umboð býráðsins í stýrinum fyri Suðuroyar Ellis- & Røktarheim sigur, at stýrið ikki hevur viðgjørt nakra ætlan at útbyggja verandi røktarheim á Tvøroyri, ella at byggja av nýggjum í Vági.

Samanumtikið metir eitt einmælt kommunustýri í Vági, at alt ov nógvir leysir endar vóru í uppskotinum til bygging av ætlaða røktarheiminum í Vági. Men ætlar landsstýrið at byggja røktarheim í Vági, so vil kommunan útvega grundøki til hetta. Tað verður bara ikki á byggiøkinum hjá miðnámsskúlanum á Vágseiði. Tað skal nýtast at byggja nýggja miðnámsskúlan á.

Niðurstøða okkara er tí púra greið:

- Vágs býráð heldur fast við, at ætlaða byggingin av miðnámsskúlanum á Vágseiði heldur fram.
- Vágs býráð er ikki fyri at blanda bygging av røktarheimi saman við byggingina av miðnámsskúlanum. Býráðið hevur ta støðu til hetta, at talan er um tvær ymiskar verkætlanir, og eiga ikki at verða settar hvør móti aðrari.

Vit vóna, at landsins myndugleikar virða ta vælvild og arbeiði, ið Vágs býráð hevur gjørt í sambandi við nýggju miðnámsskúlabyggingina. Hetta er gjørt út frá teirri sannføring, at vit vilja skapa bestu karmarnar á útbúgvingarøkinum, ungdóminum í Suðuroynni at gagni.

# Burturvið at Tvøroyrar kommuna sleppur at broyta dagstovnalógina

**Elin Lindenskov**
*býráðslimur í Havn*
*www.lindenskov.com*



Eg var skelkað, tá ið eg hoyrdi tíðindini, at landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum Hans Pauli Strøm hevur gjørt semju við Tvøroyrar býráð, sum inniber, at dagstovnalógin skal broytast. At landsstýrið ger avtalur við eina kommunu um at broyta eina lóg er burturvið. Enntá broyta eina lóg orsakað av einum persónsmáli á Tvøroyri.

Eg sat sum forkvinna í sosialunevnd í Tórshavnar kommunu, tá fyrsti frítíðarskúlin í landinum varð settur á stovn. Har var eingin ivi, frítíðarskúlin var eitt frítíðartilboð til børn aftan á skúlatíð. Í grundgevingini fyri at seta á stovn frítíðarskúlan stendur: »Endamálið er fyrst og fremst at tryggja foreldrunum, sum eru til arbeiðis, at børn teirra eru í góðum hondum eisini aftan á vanliga skúlagongd. Miðað verður tó eisini ímóti at veita børnunum eitt spennandi og mennandi frítíðartilboð, hetta fyri at tey ikki skulu kenna tað, sum eru tey í skúla allan dagin.« Tí var heldur eingin ivi um, at starvsfólkini á frítíðarskúlanum skuldu vera námsfrøðingar.

Dagstovnalógin virkar væl og er í dagliga arbeiðinum ein stór hjálp bæði á stovnum hjá kommununum og Pedagogfelagnum. Tað kann ikki verða meiningin, at ein kommuna, sum ikki vil halda lógina, skal fáa møguleikan at broyta hana, sum henni lystir.

Sum skilst ætlar landsstýrið at broyta lógina soleiðis, at leiðarin á frítíðaskúlanum ikki skal vera námsfrøðingur, men eins væl kann vera læraralærd/ur. Grundgevingin er, at tað eru børn í skúlaaldri sum eru á frítíðarskúlunum.

Grundgevingin er púra burturvið. Frítíðarskúlin er als ikki eitt skúlatilboð, men har-afturímóti eitt frítíðartilboð til børn aftan á skúlatíð.

Av tí at frítíðarskúlin er eitt tilboð aftan á skúlatíð, er tað ikki uppgávan hjá einum lærara at verða leiðari. Harafturímóti er tað ein sjálvsagdur rættur hjá námsfrøðingum. Lærarin er lærd/ur at læra frá sær. Námsfrøðingurin er lærd/ur at menna og hava umsorgan fyri børnunum.

Eg fari inniliga at heita á landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum um at taka tann partin av avtaluni við Tvøroyrar kommunu aftur, sum handlar um broyting av leiðarastarvinum á frítíðarskúlunum í dagstovnalógini. Um henda lógarbroytingin verður framd, bara tí ein kommuna ikki vil halda landsins lógir, so kunna vit vænta mangt slíkt í framtíðini.

Harfaturat skilst, at landsstýrið hvørki hevur kunnað ella ráðført seg við Pedagogfelagið um lógarbroytingina. Hetta er vanviðring av fakfelagnum. Og tað er syrgiligt, at hetta verður framt undir leiðslu av Javnaðarflokkinum.

# Koyrivegurin ímillum Hvannasund og Viðareiði

Náttina til 12. September 2004 vóru nógv skriðulop á Viðareiðisvegnum. Ongin fólkaskaði hendi hesaferð, men tað er bert ein spurningur um tíð, áðrenn tað hendir.

Viðareiðisvegurin hevur altíð verið ein vandafull farleið, orsakað av grótlopum, skalvalopum og skriðulopum.

Leiðarin á vegdeildini hjá Landsverki, Finnleif Djurhuus, segði í Degi og viku í kvøld, at onki kundi gerast fyri at tryggja verandi farleið.

Dagliga koyrir ein stórur partur av viðingum til Klaksvíkar og aðrastaðni til arbeiðis og í skúla.

Sambært bóklinginum »Ferðslan 2003« hjá Landsverki koyra 412 akfør um dagin eftir Viðareiðisvegnum.

Sum støðan er, sleppa skúlabørn, sum ganga í framhaldsdeildini í Klaksvík, ikki í skúla, tí bussur koyrir ikki eftir Viðareiðisvegnum, tí tað er lopið undan vegnum.

Støðan er ótolandi og Viðareiðis kommuna og allir viðingar kunnu ikki longur góðtaka ta vandafullu farleið, sum Viðareiðisvegurin er.

Vit fara tí at biðja Føroya Løgting beinanvegin at skipa so fyri, at neyðugur peningur verður játtaður til tunnilsgerð úr Hvannasund til eystursíðuna á Viðoynni.

Vinarligast

*Vegna allar viðingar*
**Viðareiðis Kommuna**
**Jógvan Nybo**
**Kári Kallsberg**
**Hans Jákup Kallsberg**
**Bjarti Matras**
**Árni Absalonsen**